# Leggja alt landið lamið í eitt samdøgur

**Í næstu viku verða skúlar stongdir um alt landið í eitt samdøgur. Tað verður heldur ongin sigling við strandferðsluni og arbeiðið á sjúkrahúsinum verður nógv skert**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Trýst elvir til móttrýst.

Tað má landsstýrið nú sannað meiri enn nakað annað.

Í síðstu viku spenti Landsstýrið bogan á tamb fyri at steðga einum hóttandi verkfalli hjá sjúkrarøktarfrøðingunum á teimum trimum sjúkrahúsunum og á heilsuskúlanum í Suðuroy.

Landsstýrið legði sostatt málið fyri fútarættin, sum gav tí viðhald og steðgaði verkfallinum.

Men slíka mannagongd vilja fakfeløgini ikki góðtaka og nú hava tey svara líka kontant aftur. Tí hava heili 25 fakfeløg, sum hava starvsfólk hjá tí almenna, nú lýst verkfall í 24 tímar í næstu viku.



*Fakfeløgini taka tað í fullum álvara, at manangongdin at leggja ósemjur á arbeiðsmarknaðinum fyri fútarættinm, skal steðgast. Eftir fund í tveir dagar hjá Starvsmannafelagnum eru tey samd um at leggja samfelagið lamið næsta fríggjadag*

Verkfallið byrjar á midnátt hóskvøldið 19. mai og endar á midnátt fríggjakvøldið 20. mai.

Verkfallið umfatar at kalla allar almenna tænastur og tað fer at leggja mestsum allar almennar tænastur lamnar hetta samdøgurið, verkfallið varar.

Sostatt verður ongin skúlagongd kring alt landið næsta fríggjadag. Harafturat verður arbeiðið á teimum trimum sjúkrahúsunum, á ellis- og røktarheimum og á sambýlum, eisini nógv skert. Somuleiðis verða heima-hjálp, heimarøkt annars og aðrar heilsutænastur eisini munandi skerdar. Øll Strandferðslan veður eisini løgd lamin næsta fríggjadag og tað verður heldur ongin postur.

## Ágangur ímóti fakfeløgunum

Fakfeløgini siga, at tað er sera álvarsamt, tá ið landsstýrið brúkar fútarættin til at steðga eini arbeiðsósemju og at tí hava gjørt av at svara líka álvarsliga aftur.

Landsstýrið hevur fleiri ferðir seinastu árini brúkt fútarættin til at steðga arbeiðsósemjum.

Hetta er at sníkja fremmandar arbeiðsrættarreglur inn á føroyska arbeiðsmarknaðin, sum ikki eru í gildi í Føroyum, siga fakfeløgini.

Hetta halda fakfeløgini er ágangur ímóti teimum - serliga nú ein arbeiðsbólkur, sum landsstýrið sjálvt hevur sett, arbeiðir við at finna loysnir, sum allir allir partar kunnu góðtaka, fyri, hvussu slíkar ósemjur skulu loysast.

Serliga ágangandi halda tey tað vera, tá ið landsstýrið ger slíkt í einum ári, har í sáttmálasamráðingar standa fyri durum.

Hetta kann ikki góðtakast og hava tey gjørt av at lýsa arbeiðsssteðg í eitt samdøgur í næstu viku.

Tey ávara eisini fútarættin ímóti at taka fleiri slík mál til viðgerðar.

Tað var ósemjan um umleggingarnar á føðideildini, sum førdi við sær, at sjúkrarøktarfrøðingarnir lýstu verkfall og tað var hetta verkfallið, sum landsstýrið fekk fútarættin at steðga

Men tey 25 fakfeløgini leggja staðiliga dent á, at verkfallið í næstu viku hevur als onki við ósemjuna um føðideildina at gera. Verkfallið verður eina og aleina sett í verk fyri at mótmæla, at fútarætturin verður brúktur sum jarnbrot fyri at steðga eini arbeiðsósemju.

Tey 25 fakfeløgini, sum fara í verkfall frá á midnátt hóskvøldið til á midnátt fríggjakvøldið í næstu viku, eru:

Starvsmannafelagið
Almanna- og heilsurøktarafelagið
Havnar Arbeiðskvinnufelag
Føroya Pedagogfelag
Økonomafelag Føroya
Ljósmøðrafelag Føroya
Føroyskir Fysioterapeutar
Ergoterapeutfelagið
Radiografar í Føroyum
Bioanalytikarafelagið
Maskinmeistarafelagið
Musiklærarafelagið
Heilsuhjálparfelagið
Landsfelag Handverkaranna
Føroya Handverkarafelag
Føroya Tekniska Lærarafelag
Magistarafelag Føroya
Føroya Skiparaog Navigatørfelag
Lærarafelag Handilsskúlans
Føroya Postfelag
Føroya Psykiatrifelag
Føroya Lærarafelag
Føroya Byggifrøðingafelag
Yrkisfelag Studentaskúlaog HF lærara
Felagið Føroyskir Sjúkrafrøðingar

Verkfallið umfatar bara tann partin av arbeiðsøkjunum hjá hesum fakfeløgunum, sum hava við tað almenna at gera.

# Fara ikki at stoyta bensin á bálið

**– Hóast 24 tíma verkfallið í næstu viku helst er ólgógligt, fer landsstýrið ikki at biðja fútarættin steðga tí. Tað hevði bara gjørt støðuna enn spentari, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Landsstýrið ætlar ikki at fáa fútarættin at steðga 24 tíma verkfallinum, sum 25 fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum hava lýst frá hóskvøldinum 19. mai á midnátt til á midnátt fríggjakvøldið 20. mai.

Tað sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Hann leggur kortini afturat, at samgongan hevur ikki viðgjørt spurningin, men hann kann ikki hugsa sær til, at landsstýrið fer at taka nøkur stig í hesum sambandi.

Orsøkin til at landsstýrið ikki ger tað, er útfrá teirri



*– So leingi vit onga aðra skipan hava, er fútarætturin okkara einasti møguleiki, tí tað er ikki rættvíst, at vit altíð skulu noyðast at góðtaka tað, sum fakfeløgini gera, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum*

sannroynd, at tað loysir seg ikki at stoyta bensin á bálið.

– Verkfallið, sum er lýst í næstu viku er allarhelst eisini ólógligt. Men at lagt tað fyri fútarættin, hevði bara gjørt støðuna enn spentari enn hon er, sigur landsstýrismaðurin, sum hevur ábyrgdina av sáttmálasamráðingunum ímillum landsstýrið og fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum.

## Fútarætturin einasti møguleiki

Eitt 24 tíma verkfall fer at leggja allar almennar tænastur lamnar tað samdøgurið, tað varar. Hvussu nógv hetta fer at kosta landskassanum, veit landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki.

Men hann veit, at verkfallið fer at gera, at landsstýrið sparir 2-3 milliónir í lønarútreiðslum hetta samdøgurið verkfallið varar.

Bárður Nielsen heldur ikki, at tað var eitt mistak at leggja fráboðaða verkfallið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum í síðstu viku fyri fútarættin.

– So leingi vit ikki hava eina greiða skipan fyri, hvussu vit loysa ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, er fútarætturin okkara einasti møguleiki.

Sum er, kunnu fakfeløgini lýsa verkfall, táið ósemjur taka seg upp, uttan at arbeiðsgevarin hevur nakran sum helst møguleika at svara aftur og tað er ikki rættvíst.

– Tá ið ein arbeiðsgevari metir, at eitt verkfall er ólógligt, er tað ikki rættvíst, at hann bara skal noyðast at góðtaka eitt verkfall, tí at vit onga skipan hava til at loysa slíkar ósemjur.

– Okkara einasti møguleiki er tískil at fara í fútarættin og tí er hetta okkara einasta mótpæl, tá ið vit meta, at eitt verkfall er ólógligt, til vit fáa eina aðra skipan. At vit fara í fútarættin er ikki øðrvísi enn at fakfeløgini hótta við verkfalli.

## Ein neyðloysn

Annars er hann ikki samdur, tá ið fakfeløgini siga, at landsstýrið fleiri ferðir hevur brúkt fútarættin at steðga arbeiðsósemjum.

– Tað hava vit gjørt tríggjar ferðir seinastu árini, tá ið vit meta at fakfeløgini eru farin heilt av kós og tað haldi eg ikki so so ofta, sum vanliga uppfatanin annars er.

Bárður Nielsen ásannar, at tað er eitt víðgongt stig at leggja eitt mál fyri fútarættin og hann sigur, at tað er ikki ein møguleiki, sum Landsstýrið fer at brúka í óðum verkum.

Kortini ásannar, at skipanin, sum er í dag, er ov vánalig hjá báðum pørtum.

– Skipanin vit hava í dag er avoldað og tí er tað alneyðugt, at bólkurin sum arbeiðir við at finna eina skipan, sum báðir partar kunnu góðtaka, ger sítt arbeiði liðugt.

Nú er hendan ósemjan sprottin burturur úr ósemjuni um føðideildini. Í tí sambandi hevur verið funnist at landsstýrinum tí tað ikki bíðaði við at taka umleggingarnar á føðideildini upp til sáttmálasamráðingarnar verða í heyst.

Men tað er Bárður Nielsen ósamdur í.

– Leiðslubygnaðurin og umleggingarnar á føðideildini eru ikki sáttmálaspurningar. Tað eru spurningar fyri leiðsluna á Landssjúkrahúsinum og tað kann ikki vera nakað ivamál um, at hetta er ein spurningur um leiðslurættin hjá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum, sigur Bárður Nielsen.